# Vina 90 ár



Sunnudagin verður 90 ára føðingardagur. Ikki í sjónvarpinum, men í Nólsoy.

Olevina Joensen, vanliga nevnd Vina, fyllir 90 ár.

Tað, sum serliga hevur eyðkent Vinu upp gjøgnum árini, er hennara ómetaligi blíðskapur, tá fólk er komið á gátt. Vina hevur eisini eitt óvanliga lætt sinni, sjálvt um hon ikki hevur havt undanbrekku gjøgnum lívið.

Maðurin, Ville, var ógvuliga illa plágaður av Parkinson sjúku, og fór á alt ov ungum árum. Vina hevur eisini upplivað at mist tveir synir, báðar á sjónum. Annar var navnframi Ove Joensen, sum í 1986 róði allan tann langa tein úr Nólsoy til Langelinje í Danmark. Hin var Villy, sum bert var fyrst í 20-unum, tá hann druknaði.

Hóast hetta er Vina ongantíð fallin í fátt.

Vina hevur altíð tikið virknan lut í bygdarlívinum, og verið við í hvørjum vási, sum hevur verið. Heilt fram til orkan fór at ganga undan hevur Vina verið fastur fúsur sum kokkur til alla matgerð, tað veri seg brúdleyp, bygdarveitslur ella ervi.

Henni hevur altíð dámað væl at komi út, og tók við opnum ørmum ímóti nýggju dilluni sum tað gjørdist, tá bingo kom til Nólsoyar.

Sunnudagin er føðingardagurin, men sjálvt gildið verður hildið leygardagin. Tað skal standa í Royndarhúsinum, og fólk eru vælkomin at støkka inn á gólvið millum klokkan 14 og 19.

Millum gestirnar verða børnini hjá Vinu, Kirstin, Hans Sofus, vanliga nevndur Ba, Julia og Lena.

www.ebenezer.fo

SUNNUDAGSSKÚLIN

í Ebenezer er hvønn sunnudag kl. 12.00

**Øll eru hjartaliga vælkomin!**



EBENEZER



## TØKK

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum vístu samkenslu við vitjan, hjálpsemi og umsorgan, tá

**Jan Skæling**

doyði og fór til gravar.

**Magnus og Gudmund**

## TØKK

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálp, tá mamma okkara

**Guðrun Rubeksen**

doyði og fór til jarðar.

Ein serlig tøkk til Hera Joensen, prest, sangarar og urguspælarar.

**Børnini**

## TØKK

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá elskaði pápi, verðpápi og abbi okkara

**Eilert Mikkelsen**
**Tórshavn**

brádliga andaðist og varð jarðaður.

Takk til Derhard Jógvanson prest, organistar, sangarar, berarar og øll tykkum, sum á ymsan hátt hjálptu til við ervinum. Takk fyri kransar, blómur og heilsanir. Takk til øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

***Vegna tey avvarðandi***
**Guðrun, Eyðun, Pætur, Bjartur, og Birita**
**Halla, Ætli og Beinta**

†

Kunngjørt verður, at okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Evie Niclasen**
**Tórshavn**

andaðist í Vallalíð týsdagin, 83 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Ebenezer leygardagin kl. 13.00.

***Familjunnar vegna***
**Erik, Snorri og Arnfinn**

Tey, ið vilja minnast Evie, kunnu lata Zarepta eina peningagávu, konto í Eik.



## TØKK

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá okkara høgt elskaði maður og pápi

**Kristian Bertholdsen**
**Klaksvík**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til starvsfólkið á Klaksvíkar sjúkrahúsi og Landssjúkrahúsinum. Tøkk til tykkum øll, sum vístu umsorgan, fyri heilsanir og alla hjálp. Tøkk fyri troystarrík orð í kapellinum, í Betesda og á grøvini. Tøkk til tykkum, ið fylgdu honum til hansara síðsta hvíldarstað á fold. Tøkk fyri gávur til Akurin.

**Malena**
**Harley, Eddie og David**